# Oyggjaleikir 2005
SHETLAND



**Sosialurin í Hetlandi**

*Jákup Mørk, blaðmaður jakup@sosialurin.fo*
*Eyðun Klakstein, blaðmaður eydun@sosialurin.fo*
*Jens Kristian Vang, myndamaður jensk@sosialurin.fo*

# Aksel streyk í finaluna

**Badmintonspælararnir hava fingið besta úrslitið nakrantíð í einstaklingakappingini. Aksel Poulsen kom í finaluna eftir teir mongu dystirnar týsdagin, og Ragnar Rasmussen hevur vunnið bronsu. Fríggjadagin skal Aksel spæla um gullið**

BADMINTON

*Eyðun/Jens Kr.*
*eydun@sosialurin.fo*

**Lerwick:** Føroyar hava nógvar góðar badmintonspælarar í løtuni, og tað sæst eisini aftur á Oyggjaleikunum.

Týsdagin var kappingin í einmansleiki, og her gekk væl hjá føroysku monnunum.

Bæði Ragnar Rasmussen og Aksel Poulsen komu í hálvfinalurnar, og har spældu teir báðir spennandi dystir.

Ragnar Rasmussen spældi ímóti tí væl upplagda grønlendska spælaranum, Bror Madsen, og føroyski spælarin var við undirlutan. Bror Madsen vann 15-6 og 15-7. Longu í 1/8 finaluni royndi Bjartur Lamhauge seg ímóti Bror Madsen, og hann noyddist eisini at lúta.

### Aksel gjørdi bart

Í hinari hálvfinaluni hittust Aksel Poulsen og Ben Martin av Guernsey, og her eydnaðist tað Aksel at vinna dystin 2-0. Settini endaðu 15-14 og 15-9.

Ben Martin hevði fyrr í kappingini sent Erland Poulsen, beiggja Aksel, úr kappingini, men Aksel fekk hevnt tapið í hálvfinaluni.

Fríggjadagin spæla Aksel Poulsen og Bror Madsen í finaluni, og tá verður spennandi at vita, um Aksel kann fara allan vegin og vinna fyrsta føroyska gullið í einmansleiki í badminton á Oyggjaleikum.

Longu nú er tað greitt, at føroyska úrslitið í einmansleikinum er tað besta nakrantíð. Ein bronsa er tryggjað, og Aksel Poulsen vinnur antin gull ella silvur. Meðan bíðað verður eftir finaluni, kunnu Aksel og hinir føroysku badmintonsspælararnir stytta sær um stundir við tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.



*Aksel Poulsen spældi seg týsdagin í finaluna í einmansleikinum í badminton*

## Vilja kempa fyri Oyggjaleikum

**Lerwick:** Føroysku badmintonsspælararnir vóru vónbrotnir, tá ið tíðindini bórust um, at badminton verður ikki við á Oyggjaleikunum á Rhodos um tvey ár.

– Um vit ikki hava Oyggjaleikirnar at stíla eftir, so rokni eg við, at tað fer at ávirka hugin at venja. Oyggjaleikirnir hav a verið við til at styrkt munandi um føroyskt badminton, sigur Bjartur Lamhauge, ein av føroysku spælarunum á Oyggjaleikunum.

Tað hoyrist, at tey, sum varða av badminton á teimum ymsu oyggjunum, sum eru við til Oyggjaleikir, ætla at gera eina seinastu roynd fyri at fáa badminton við á Rhodos í 2007.

– Um vit ikki sleppa við til Oyggjaleikirnar næstu ferð, so er ein møguleiki at skipa fyri einari kapping millumtær oyggjarnar, sum plaga at luttaka í badminton, sigur Bjartur Lamhauge.

**ek**



*Ein løta uttan yvirblikk kostaði týdningarmikil fet, tá Bogi Lenvig týsdagin gjørdist nummar fýra á 5.00 metrum*

Mynd: Jens Kristian

## Misti yvirblikki

**Lerwick:** - Eg haldi, at yvirblikki var ikki í lagi hasa løtuna. Eg liggi fremstur í feltinum, og so koma tríggir aftanífrá. Tá eg síggi, hvat er hent, er eitt hol longu komið, og tað hevði kostað sera nógvir kreftir, um eg skuldi roynt at lukka tað.

Soleiðis staðfesti Bogi Lenvig, tá vit eftir renningina á 5.000 metrum fingu orðið á hann.

Renningin háttaði seg soleiðis, at tríggir rennarar stungu av eftir fyrsta triðingin, og hesar fekk Bogi ongantíð aftur. At hann kortini hevði nakað eftir í sær, prógvaði hann væl og virðiliga á seinastu rundini, tá hann yvir hálvan umgang spurtaði seg sannførandi inn á fjórða plássið. Men nøgdur var hann kortini ikki. Ikki minst, tí hann við hesum ikki megnaði at verja bronsuna, sum hann vann á Guernsey fyri tveimum árum síðani.

Tíðin, sum verður runnin, er annars ikki so ræðandi, og hevði eg runnið rætt, so kundi eg væl verið við. So nøgdur eri eg avgjørt ikki, staðfesti Bogi Lenvig at enda.

Sam Vang tók eisini lut. Hann gjørdist næst aftastur av luttakarunum.

**-jm**